Panic fer til FS Vágar

Jovan Radinovic-Panic, sum í ár hevur spælt við HB, skal komandi ár spæla í FS Vágum. Tað skrivar felagið á heimasíðu sínari. Jovan kom til HB, tá tað stóð greitt, at felagið ikki fekk fatur á Milan Kuljic, tí ávísar ásetingar í útlendingalóggávuni ikki vórðu fylgdar.

Men nú HB loksins fær mannin, sum tey bíðaðu eftir, ynskti felagið ikki at leingja sáttmálan við Jovan. Eitt skifti ljóðaði, at hann skuldi spæla við NSÍ ístaðin,m en tað verður altso í Sandavági, at hann nú fer at vísa síni evni.

Panic spældi í ár 20 dystir við Formula-liðnum hjá HB, og skeyt hann eitt mál í hesum.

Bjarni aftur á Argjum

Bjarni Jørgensen verður ikki at síggja á Skála liðnum næsta ár. Sambært AB heimasíðuni er hetta greitt, eftir at framrættaði miðvallarin fríggjadagin skrivaði undir sáttmála, sum ber við sær, at hann hevur bundið seg at spæla við AB í 2007.

Bjarni Jørgensen, sum er 22 ára gamal, spældi ungdómsárini í HB. Í 2004 spældi hann við AB, sum hetta árið endaði á triðja plássi í næstbestu deildini. Í 2005 og 2006 hevur Bjarni spælt við Skála. Fyrra árið royndist ógvuliga væl bæði hjá Skála og Bjarna Jørgensen. Í ár hilnaðist ikki so væl. Bjarni var skaðaplágaður stóran part av kappingarárinum.

Hetta sigur Maria Steinkross hjá SÍ, sum fyri fyrstu ferð skal leika ímóti gomlu liðfeløgunum úr TB sunnudagin. ÍF tekur eisini ímóti KÍF í Fuglafirði.

Toppdystur verður á Tvøroyri, tá TB tekur ímóti SÍ. – Eg gleði meg ikki til dystin, sigur fyrrverandi TB-leikarin, Maria Steinkross, sum nú leikar fyri SÍ. Vinnarin av dystinum leggur seg á odda í bestu kvinnudeildini.

– Eg gleði meg ikki

FLOGBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Tveir dystir eru á skránni í meistaradeildini hjá kvinnum í vikuskiftinum. Annar teirra er á Tvøroyri, har TB tekur ímóti SÍ. Eftir eina heldur keðiliga byrjan tykist SÍ nú vera koma rættiliga í gongd við sítt kappingarár. Tær hava vunnið tveir dystir á rað, og seinast vunnu tær tryggan 3-0 sigur á Giljanesi ímóti Drátti.

Síðsti dysturin hjá TB gekst minni væl. Ta ferðina taptu tær 3-1 á Kambsdali ímóti ÍF, so tær vilja óiva venda hesi gongdini. Tær vunnu tó fyrstu tveir dystirnar, so bæði liðini, sum møtast í høllini í Trongisvági, hava fýra stig og eru sostatt partar av oddastríðnum hjá kvinnunum.

Fyri ein leikarar verður dysturin í Trongisvági serligur. Maria Steinkross hevur alt sítt lív spælt við TB. Seinastu árini hevur hon verið libero á besta kvinnuliðnum hjá TB, sjálvt um hon hevur búð í Havn.

Í ár hevur Maria tó valt at ganga aðrar leiðir. Hon er farin til Sørvágs at spæla libero hjá SÍ. Maria sigur seg ikki vera alt ov spenta at møta gamla felagnum hjá sær.

– Tað er við blandaðum kenslum, at eg fari suður at spæla dyst. Eg havi altíð leikt við TB, og tí verður hetta eitt sindur merkiligt. Tó skal sigast, at vit vilja fegnar vinna dystin, tí um vit vinna, so leggja vit okkum á odda í deildini.

Hjørdis brotið fingurin

Seinni dysturin, sum er á skránni í vikuskiftinum, verður á Kambsdali. Her tekur ÍF ímóti KÍF. ÍF tapti sín fyrsta dyst í ár, men eftir hetta hava tær vent gongdini. Síðsta vikuskiftið vunnu tær tveir dystir, so nú hava tær fýra stig og liggja heilt frammi í oddinum.

Hjá KÍF sær heldur verri út. Tær byrjaðu væl og vunnu fyrsta dystin ímóti SÍ 3-0. Síðani vunnu tær FK-kappingini, men eftir hetta hevur bert gingið skeiva vegin. Tær hava nú tapt tveir dystir á rað, og seinast máttu tær lúta 3-0 á heimavølli fyri Drátti. Í hesum dystinum misti KÍF eisini ein av týdningarmestu leikarunum, tá Hjørdis Johannesen breyt fingurin. Sjálvt um hon leikti allan dystin ímóti Drátti, so hevur hon fingið at vita, at hon skal binda frið í nakrar vikur. Hetta er stórur missur fyri KÍF, tí Hjørdis er ein ótrúliga góður leikari.

StÍF vil varðveita oddasessin

H71 hevur alt fólkið tókt, tá teir taka ímóti StÍF sunnudagin. StÍF manglar enn Svein Justinussen, men bróðurin Leivur er klárur aftur eftir skaða.

HONDBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

H71 tekur sunnudagin ímóti StÍF í høllini í Hoyvík. StÍF liggur á odda í Atlantic Airways deildini við trimum stigum, meðan H71 hevur tvey stig.

H71 hevur síðani síðsta kappingarár verið fyri stórum broytingum. Nógvar av berandi kreftunum eru givnar, og tískil hava nógvir av ungu leikarunum hjá felagnum fingið møguleikan á besta liðnum. Teir hava spælt væl higartil, og málverjin, Levi Nybo sigur, at H71 fer út til hvønn dyst at spæla teirra spæl. Hann metir tó, at dysturin ímóti StÍF ikki verður nakar lættur dystur.

– Vit hava nógvar ungar leikarar, og tí kunnu vit bara royna at spæla okkara spæl. Vit taka ein dyst á gangin, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað ber. Dysturin ímóti StÍF verður ikki lættur, og um vit skulu vinna, so mugu vit heilt víst betra um verjuna.

Leivur klárur aftur

Hoyvíkingar hava allar mans tøkar til dystin sunnudagin, men so væl stendur ikki til hjá StÍF. Ter mangla enn Svein Justinusen, sum eftir øllum at døma missir størsta partin av kappingarárinum. Bent Djurhuus hevur heldur ikki vant í vikuni, men hann verður væntandi við sunnudagin. Leivur Justinusen hevur tó vant í vikuni, og vit frætta av Skála, at hann verður partur av hópinum ímóti H71 sunnudagin.

Av Skála siga teir harafturat, at teir ætla at halda fast um góða gongdina, og tí ætla teir sær ein sigur í Hoyvík sunnudagin.

Toppdystur á Kambsdali

Fyrsti toppdystur í meistaradeildini hjá monnum verður sunnudagin, tá ÍF tekur ímóti Fram. Bæði liðini hava fult stigatal, so vinnarin sunnudagin leggur seg á odda í deildini.

FLOGBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Tveir dystir eru eisini á skránni í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum.Fyrri dysturin verður longu í kvøld, tá Fleyr tekur ímóti SÍ í Havn. Fleyr má metast at vera favorittur í hesum dystinum, og teir fara nokk at leggja nógv fyri í sínum royndum at fylgja oddaliðunum báðum, sum longu nú eru fýra stig undan hinum liðunum.

Størsti spenningurin verður tó á Kambsdali, har ÍF tekur ímóti Fram. Hesi bæði liðini hava vunnið allar sínar dystir, og tí er av stórum týdningi hjá báðum at vinna dystin sunnudagin fyri at varðveita oddasessin.

Vit frætta úr Fuglafirði, at onkur leikari hevur smærri snuddir, men at hetta ikki forðar teimum at spæla dystin sunnudagin. Vit frætta úr Fuglafirði, at teir ætla at vinna á Fram, tí teir ætla framhaldandi at vera fremst í deildini eftir komandi dyst.

Men ÍF fer ikki at vinna uttan mótstøðu. Fram ætlar eisini at vinna dystin í Fuglafirði sunnudagin, og tí kunnu fólk vænta eitt satt brak á Kambsdali, tá bæði oddaliðini møtast.